# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ávegis

Í árinum, sum farið er, hava vit her í Miðlahúsinum gjørt okkara ýtarsta til tess at geva føroyingum úti sum heima eitt fjølbroytt fjølmiðlatilboð. Vit fara í nýggja árinum at halda fram við hesari kós, og vit fara at leggja alla okkara orku í at menna hesa kós til tess at geva okkara lesarum, lurtarum og viðskiftafólki- og fyritøkum tær bestu tænastur. Tær formligu og fysisku fortreytirnar eru til staðar – fyritøkan er politiskt óheft, húsaumstøðurnar eru tær best hugsandi - hugaligar og íblásandi og staðsetingin í hjartanum á gomlu Havnini er tann best hugsandi.

Fyritøkubygnaðurin ella strukturin gevur nýggjar og nógv øktar møguleikar at veita lesarum, lurtarum, lýsarum og brúkarum sum heild góðar og fjølbroyttar tænastur. Við at sameina portal, blað, útvarp og miðlahús hava vit eitt einastandandi høvi at framleiða eina tænastu, sum nøktar ein støðugt vaksandi tørv á kunning, tíðindaflutningi, almennum orðaskifti, miðlan og einum sermerktum samkomuella fundarstaði. Men fyrimyndarligir karmar eru sjálvsagt ikki nóg mikið til tess at geva almenningi og vinnulívi fyrimyndarligar tænastur. Týdningarmesti parturin í hesi tilgongd er starvsfólkið – øll, sum starvast í fyritøkuni. Tað eru hesi, sum skulu fylla út karmarnar og sum skulu megna at nøkta tørvin hjá einum tilvitandi og tíbetur alt meira krevjandi brúkara.

Vit fara tí í nýggja árinum at leggja stóran dent á at geva starvsfólkinum høvi at menna og at eftirútbúgva seg, so vit øll í fyritøkuni gerast enn betur før fyri at røkja okkara arbeiði. Starvsfólkamenning er hjartatátturin í einihvørjari nútímans fyritøku. Í roynd og veru snýr alt hetta seg um innihald og um virðing fyri okkara brúkarum og okkara handverki. Vit fara tí í framtíðini at seta okkum sjálvum støðugt uppaftur størri krøv um dygd, breidd og fjølbroytni í teimum tilboðum, vit bjóða. Vit eru ikki komin á mál við okkara ætlanum um støðugt batnandi tilboð, men vit eru ávegis.

**Sosialurin**

## Skerpað eftirlit

LEIVUR SØRENSEN

Í kjalarvørrinum av skrivingini í Dimmu, um viðurskiftini í føroyska heilsuverkinum, verður nú ljós varpað á ein lækna, tí hann er settur undir skerpað eftirlit av donsku myndugleikunum. Listin av læknum og øðrum, ið settir eru undir hetta eftirlit, er langur, men hevur Dimma, av eini ella aðrari orsøk, bert valt at taka hann burturúr rúgvuni, helst tí, at hann er kendur her á landi, og við ávísum millumbilum kemur til Føroya at viðgera fólk fyri skaðar í teimum sokallaðu bleytu kropslutunum, t.v.s. musklum, spengrum v. m. Hetta hevur ikki dámt øllum, t. d. á nøkrum fysiurgiskum viðgerðarstovnum, tí hesin lækni, við sínum ótrúliga góða, men logiska viðgerðarhátti, hevur gjørt, at fleiri sjúklingar við sokallaðum kroniskum brekum, ikki longur hava tørv á, at koma til framhaldandi viðgerðar hjá teimum. Hesir sjúklingar hava jú givið góðar fastar inntøkur, sum hava munað væl í hørðu kappingini eftir sjúklingum, nú viðgerðarstovnar skjótast upp sum hundaland í nærum hvørjari bygd. Í seinnu greinini í Dimmu, 21. des. stendur, at lógin ikki er komin í gildi í Føroyum. Hetta kann tykjast løgið, serliga tá hugsað verður um alt rumblið, sum hevur verið av skeivum viðgerðum, feilum hjá læknum, og tørvandi vilja hjá summum læknum, at taka sær av sjúkum børnum v. m. Men tá vit síggja partar av manningini í løggevandi tinginum, so hevur tað helst sína orsøk, at lógin ikki er sett í verk. Teir eru jú eisini bert vanlig menniskju, sum fyrst og fremst hugsa um egin áhugamál. Eisini kom fram í greinunum, at alt helst ikki ruggaði rætt, sum hesin læknin tekst við. Men her vil eg bert vísa á, at einaferð lýsti hann til almennan fyrilestur í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, har hann í mynd og talu greiddi frá um sínar viðgerðarhættir. Hóast nógv fólk møttu, so sást ikki ein einasti lækni, og bert fáir praktiserandi viðgerðarar vóru millum áhoyrarnar. Eisini veit eg, at hann skrivar journal fyri hvønn sjúkling, hann viðgerð her heima, umframt at hann tryggjar sær, at sjúklingurin hevur verið til kanningar, so brot o. a. kunnu útilokast. Eisini vil hann fegin síggja journalir v. m., men tað er ikki altíð so lætt, at fáa slíkt útleverað frá sjúkrahúsum. Eg vil hervið heita á tað nývalda løgtingið, um skjótast gjørligt at fáa lógina um skerpað eftirlit at galda fyri Føroyar, so ábyrgdir kunnu plaserast, til tryggleika fyri tey, sum á ein ella annan hátt kenna, at tey eru skeivt viðgjørd, ella ikki hava fingið ta hjálp, teimum var tørvur á.

## Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur

Val



KARL A. OLSEN

Sjálvstýrisflokkurin

Føroyar eru vorðnar eitt valdømi, tí er neyðugt at endurskoða ábyrgdarbýtið millum land og kommunur. Eg haldi, at løgtingið skal í størri mun taka sær av landsmálum, meðan kommunurnar skulu hava størri ábyrgd av lokalmálum. Løgtingið eigur at skipa fyri nøktandi lóggávu, sum greitt ásetir ábyrgdarbýtið millum land og kommunur. Ein meginregla eigur at vera, at kommunurnar valda, har tær gjalda.

Tá kommunurnar fáa ábyrgdina av fleiri málsøkjum, so sum fólkaskúlanum og ymsum uppgávum á trivnaðar- og mentanarøkinum, so verður størri møguleiki fyri nærdemokrati – borgarin fær størri ávirkan, tí tað er styttri millum hann og kommunalu myndugleikarnar enn millum hann og landsmyndugleikarnar.

Kommunurnar mugu eisini hava fleiri inntøkur, tá tær taka yvir uppgávur frá landinum. Inntøkuøkingin kann fáast við broyttum lutfalli millum lands- og kommunuskatt.

Í sambandi við eitt øðrvísi ábyrgdarbýti eigur ein møgulig útjavning at vera umrødd. Útjavning millum land og kommunur og kommunur sínámillum er í øllum granna-londum, tí kann tað tykjast løgið, at hon ikki er skilagóð í Føroyum.

Fíggjarligu umstøðurnar hjá kommununum eru ymiskar, tí má ansast eftir, at ikki ov stórur ójavni verður á tænastustøðinum í ymsu kommununum.

Kommunurnar eiga eisini at umhugsa, hvussu tær kunnu samstarva, so at borgarin fær eina dygdargóða tænastu; ella um tær skulu leggja saman í størri kommunar eindir.

Ein annar fyrimunur, av at kommunurnar fáa nýggj málsøki at umsita, er, at almenn arbeiðspláss verða flutt frá landsmyndugleikunum til kommunurnar. Tað hevur longi verið eitt politiskt ynski at fingið fleiri almenn arbeiðspláss uttanfyri Havnina; hetta gerst veruleiki, um kommunurnar fáa fleiri uppgávur at røkja.

Tað er týdningarmikið, at borgararnir hava álit á, at kommunurnar eru førar fyri at umsita nýggj málsøki. Tað er tí umráðandi, at kommunala eftirlitið hjá Innlendismálaráðnum skipar fyri, at vantandi tænasta, skeiv umsiting ella møguligt óreglusemi hjá kommununum verður rættað.

Mín meining er, at kommunurnar avgjørt eru førar fyri at átaka sær fleiri uppgávur, og at kommunurnar í nógvum førum høvdu umsitið uppgávurnar betri enn landsmyndugleikarnir gera nú. Ein fortreyt er tó, at uppgávubýtið millum land og kommunur gerst greitt og gjøgnumskygt.

Størri nærDemokrati

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.